# Ólavur er heimsmeistari í egning

**Nevndin fyri sjómannadegnum hevur í vikuskiftinum verið í Vestmannaoyggjunum fyri at fáa hugskot**

HM Í EGNING

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Føroyar eiga framvegis besta egnaran í heiminum. Tað varð staðfest fyrr í kvøld. Heimasíðan hjá Norðlýsinum veit at siga, at Ólavur Poulsen í Klaksvík í kvøld hevur vunnið kappingina um HM í egning, sum í dag hevur verið í Vestmannaoyggjunum.

Ólavur Poulsen kappaðist við ein íslending og ein norðmann. Tíðin hjá Ólavi var 10.57 minuttir, hjá Georg Agnarsson úr Íslandi var tíðin 12.09 og hjá Roul Jensen úr Noregi var tíðin 12.54.

Tað bar ikki til hjá John Havn, sum í fjør vann kappingina í Klaksvík, at luttaka hesa ferð. Ólavur Poulsen var nýggjur føroyskur luttakari, og hóast hann ikki megnaði at taka tíðina hjá John Havn frá í fjør, so var tíðin ivaleysa góð at vinna kappingina við. Í fjør vann John Havn við tíðini 8.38.

Ólavur sigur við nordlysid.fo, at tað gekk væl, hóast hann ikki kendi íslendsku línuna. Á línuni vóru 100 húkar við einum metri ímillum hvønn húk. Í Føroyum er vanligt, at tað er 1,80 metur ímillum húkarnar. Tíggju húkar manglaðu, og tað var partur av kappingini at fáa nýggjar húkar knýttar uppí.

Norðlýsið skrivar á netinum, at nevndin fyri Føroya Sjómannadegi var í Vestmannaoyggjunum saman við Ólavi fyri at kunna seg við, hvussu íslendingar halda sjómannadag. Leygardagin vóru nógvar kappingar á skránni, og tær góvu føroyingunum nógv hugskot.

Sjómannadagur verður í Klaksvík leygardagin 19. august. Føroyingarnir, sum hava verið í Vestmannaoyggjunum, koma til hús aftur í morgin.



*Ólavur Poulsen kappast í Vestmannaoyggjunum* *Mynd: nordlysid.fo*

# Troling oyðileggur havbotnin

**Norskir granskarar eru ovfarnir av, hvussu illa troling fer við havbotninum. Botnurin í Barentshavinum sær út, sum er hann pløgdur**

UMHVØRVI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Seinastu 14 dagarnar hevur norska havrannsóknarskipið "Håkon Mosby" kannað havbotnin á leiðini, sum norðmenn rópa Tromsøflaket. Umborð eru lívfrøðingar hjá havrannsóknarstovninum og jarðfrøðingar hjá Norges Geologiske Undersøkelser.

Lívfrøðingurin Pål Buhl-Mortensen sigur við Aftenposten, at teir eru ovfarnir av tí, sum teir hava sæð higartil.

– Tað ber neyvan til at finna 100 metrar á botninum, sum ikki hava týðilig spor eftir ein trolara, sigur hann.

Við sær hava granskararnir serbygd myndatól, ið eru før fyri at avmynda sjálvt tann minsta smálutin á botni. Teir hava eisini útgerð til at taka royndir av botninum, plantum og øðrum livandi verum. Men tað eru serliga avleiðingarnar av trolingini, sum hava vakt ans.

– Vit hava eisini sæð weirar, partar av troolposum og annað, sum skip hava mist ella tveitt út. Vit hava eisini sæð okkurt kann stava frá oljuleiting, sigur Pål Buhl-Mortensen.

Myndaupptøkurnar av botninum vísa týðilig spor eftir troling bæði ein veg og annan veg, og farleiðirnar kunnu vera fleiri hundrað metrar langar. Summi spor eru rættiliga nýggj, onnur eldri, og granskararnir siga, at tað ber til at síggja, at trolarar hava ikki brúkt sama trol, tí sporini eru ymisk frá einum slagi til annað.

Í royndunum, sum "Håkon Mosby" hevur tikið upp av botni, er nógvur deyður svampur, og nú verður kannað, hví hann er deyður, og hvørjar avleiðingar hetta kann fáa. Kanningarúrslitið kemur ikki óvart á formannin í umhvørvisverndarfelagsskapinum Bellona. Fredric Hauge sigur við Aftenposten, at tey hava leingi stúrt fyri trolingini í Barentshavinum, og at vinnan eigur at finna trol, sum ikki ganga eftir botninum.

Kanningarnar hjá "Håkon Mosby" eru liður í einari umfatandi kanning, sum skal skráseta havbotnin úti fyri Norðurnoregi út á 340 metra dýpi.

# Hittust til úlvadag



*Úlvadagur í Vági. Her eru skótaleiðarar og úlvar avmyndaðir uttanfyri skótahúsini í Vági* *Mynd: D.Olsen*

Hósdagin høvdu úlvar í Suðuroynni úlvadag

Hósdagin hittust eini 60 ungir skótar, ella úlvar, sum tað verður rópt, til úlvadag í Vági. Hesir ungu úlvarnir vóru úr Vági og úr endurstovnaða skótaliðnum á Tvøroyri. Skipað varð fyri úlvakappingum, har tey ungu sluppu at renna eftir postum, har ymsir spurningar skuldu svarast og ymsar uppgávur og kappingar klárast.

Tá hetta var gjørt, lærdu tey ymiskt, ið hevur samband við skótalív og so varð kynt í grillina, so svongu úlvarnir fingu ein heitan bita. -do-

# Trý rúsevnismál í rættinum

**Sjey rúsevnismál áttu at verið fyri rættinum fríggjadagin í síðstu viku. Men fyrsta málið varð útsett. Í næsta málinum møtti ákærdi ikki upp, og triðja málið var heldur ikki av nøkrum**

RÚSEVNIR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í fjórða málinum var talan um ein mann í fyrra helvt av 30-unum, sum var ákærdur fyri brot á lógandi um rúsevnir. Hann var ákærdur fyri at hava fimm gram av amfetamin, tríggjar ectasy tablettir og nakað av hash uppi á sær, tá hann var steðgaður av løgregluni í einum bili í samband við Summar Festivalin.

Hann játtaði seg sekan í øllum, og greiddi frá, at rúsevnini, sum hann hevði keypt nakrar vikur framman undan í Havn, vóru ætlaði til egið brúk.

Ákærdi kravdi 20-30 treytaleyst hefti, tí talan var um hørð rúsevnir og ikki bara hash. Verjin vísti á, at her var talan um eina so mikið lítla nøgd av amfetamin, og at tað bert var ætlað til egið brúk. Hann metti, at ein treytaður dómur á sera stutta tíð var nokk.

Ákærdi varð dømdur 20 daga hefti, tí at talan var um vandamikil rúsevnir. Men dómurin varð treytaður, orsaka av góðu persónligu viðurskiftunum hjá manninum. Hann var eisini dømdur at rinda sakarmálskostnaðin, og hann tók við dóminum.

### Hash og ólógligar tablettir

Í næsta málinum var eisini talan um brot á rúsevninslógina. Hann var áður dømdur fyri innsmugling av hash, og í øðrum føri at hava selt 100 gram hash, keypt nakað av amfetamin og at hava hashútgerð liggjandi inni.

Í málinum nú var hann ákærdur fyri at hava átta gram av hash, umframt at hava ólógligar tablettir liggjandi inni.

Ákærdi kravdi sjey daga treytaleyst hefti, meðan verjin metti, at ein bót og treytað hefti var nóg mikið. Hann varð dømdur sjey daga treytaleyst hefti, umframt at hann skuldi rinda sakarmálskostnaðin. Hann tók við dóminum.

### Smuglaðu góð 400 gram av hash

Í seinasta málinum fríggjadagin, vóru tveir brøður ákærdir fyri brot á rúsevnislógina. Báðir hava teir áður verið í hóslag við rúsevnir, annar hevur keypt amfetamin og hin 20 gram av hash.

Í hesum málinum vóru teir ákærdir fyri at hava smuglað góð 400 gram av amfetamin til Føroyar. Tað var gjørt í samband við ein danmarkartúr hjá teimum, har teir millum annað høvdu keypt hashi. Hetta høvdu síðani sent upp við postinum til Føroyar, men brævbjálvin var steðgaður í tollinum.

Ákærdi kravdi, at yngri bróðurin fekk 50 daga treytaleyst hefti, tí hann áður hevði verið samband við hørð rúsevnir. Eldri bróðurin skuldi hava 40 daga treytaleyst hefti, kravdi hon.

Verjin metti, at ein treytaður dómur var nóg mikið, 20-30 dagar og kanska ein møgulig bót aftrat. Men málið var av so mikið tekniskum slag, at dómurin var útsettur til nú fríggjadagin.

# Rættleiðing: Ikki Moréll men Smith

Í greinini um niðurtøkuna av gamla kommunukontórinum í Vági, og ætlaða tiltakið í hesum sambandi týskvøldið, skrivaðu vit, at tað var Moréll, ið málaði sluppina, sum hevur staðið í eina skjøldrinum. Hetta er ikki rætt. Tað var hinvegin William Smith, ið málaði sluppina á glasplátuna. Moréll gjørdi og málaði hinvegin vøkur skjøldur, sum vóru nýtt við kongavitjanina í fimmtiárunum.

-do-